# VIÐMERKINGAR

SAMBAND
EIRIKUR LINDENSKOV
EIRIKUR@SOSIALURIN.FO
TLF 341800

## Loysing

Tann 17. februar í ár lýsti tingið í Kosovo landslutin í Serbia at vera sjálvstøðugt og frælst land, og við hesi loysing er enn eitt land komið afturat í Europa. Kosovo var sum kunnugt landslutur í Serbia, sum so aftur er ein leivd av tí Jugoslavia, sum fór í søguna eftir deyða Titos og eftir eina røð av kríggjum. Hesi kríggj høvdu tjóðskaparligan, etniskan og átrúnaðarligan uppruna. Kosovo er sum nevnt fyrrverandi landslutur í Serbia, men annars hevur landið verið undir ST fyrisiting síðan 1999. Loysingarrørslan er sterk og kjarnan í hesi rørslu er albanski meirilutin í fólkinum. Millum muslimsku albanarnar og kristnu serbarnar er gamalt agg fyri ikki at siga fíggindskapur, og tí er serbiski minnilutin nú illa stæddur og hevur eisini lítið gott at vænta frá tí albanska meirilutanum.

Tað ber til at staðfesta, at altjóða samfelagið í roynd og veru hevur viðurkent loysingina hjá Kosovo frá Serbia. Men enn eru tó ikki allar súðir syftar. Formliga er landið enn undir ST og stýrt av ST fyrisætinum UNMIK, samstundis sum heimurin meira ella minni hevur ásannað, at serbiska stjórnin í veruleikanum als ongan myndugleika hevur longur í Kosovo.

Roknast kann við, at ES fer at viðurkenna nýggja statin Kosovo, men hetta verður ikki uttan trupulleikar. Orsøkin er, at eitt nú Spania, sum hevur trupulleikar av loysingarrørlsum, er hart ímóti øllum loysingarrørslum, uttan mun til hvar hesar virka. Hartil kemur, at málið ikki er endaliga avgreitt í ST, og er orsøkin tann, at Kina er ikki minni neiligt mótvegis loysingarrørlsum enn Spania. Kina ber ótta fyri, at eydnast loysingin hjá Kosovo, so fer hetta at elva til sterkari loysingarrørslur í Kina, har misnøgdin er stór millum etniskar minnilutar og tjóðflokkar, sum ikki kenna seg sum kinverjar.

Afturat hesum kemur, at Rusland í mong ár hevur verið mest trúfasti sameindi hjá serbisku tjóðini. Her er talan um sera gomul mentanarlig og politisk bond, sum russiska stjórnin er sera eym um. Loysingin fær tískil sera harða mótstøðu í Ruslandi, sum við fullari ferð er á veg inn aftur í leiklutin sum stórveldi. Tað er tí enn langt á mál hjá Kosovoalbanum, og roknast má við, at NATO hermegin, KFOR, enn eina tíð kemur at standa við ábyrgdini av trygd og friði í Kosovo, sum eisini er betur fyri allar partar økinum. So leingi hetta er støðan er lítil vandi fyri, at Serbia tekur til vápnini, men hinvegin er leiðin long til tess, at friður og trygd fara at valda í hesum parti av tí Balkan, sum í øldir hevur verið eyðkent av ófriði, kríggjum og yvirgangi. Danmark stuðlar fullu loysingini hjá Kosovo, eins og Danmark var fyrst at viðurkenna loysingina hjá Kroatia. Sum heild stuðlar Danmark loysingarørslur soleingi hesar ikki virka innan danska ríkisfelagsskapin.

**Sosialurin**

## Skattur og íverksetan

**KITTY MAY ELLEFSEN**



Skattalætti til íverksetarar elvir til størri búskaparligan vøkstur og fleiri íløgur. Hetta er vísindaliga prógvað, og hava okkara nærmastu grannalond eisini gjørt nógv átøk á skattliga økinum fyri at bøta um karmarnar hjá íverksetarum.

Skattaskipanin hevur nógv at siga fyri áhugan at seta pening í nýggjar fyritøkur, serliga har váðin er stórur.

Skattareglurnar eru mangan til ampa hjá íverksetarum, ið vilja vaksa skjótt um virksemi sítt. Tí skulu íverksetarar, ið stremba eftir skjótum vøkstri, fáa skattalætta, sum gevur teimum møguleika til tess. Somuleiðis skal íverksetarum standa í boði eina íverksetarauppsparingskonto til egið virki.

**Spara saman til egið virki**

Í londunum rundan um okkum hevur uppsparingskonto til íverksetarar, har innskotið kann dragast frá í skattinum, verið ein gongd leið at ganga, fyri at økja um áhugan hjá íverksetarum at spara saman til egið virki. Uppspardi peningurin kann nýtast til rakstrarútreiðslur sum t.d. lønir, men eisini til at keypa vørur, innbúgv og annað, sum krevst til at stovna egið virki.

**Virðisbrævaoptiónir**

Tað sum eyðkennir nýggjar fyritøkur er manglandi kapitalur og tøvurin eftir neyðugu leiðsluni og marknaðarføringini til at skunda undir vøkstur av nýstovnaðu fyritøkuni. Karmar skulu tí skapast fyri, at íverksetarar kunnu løna lyklapersónum við partabrøvum. Endamálið við hesum er, at tað skal gerast lættari at fáa fólk til nýstovnað virki.

Lønar íverksetarin lyklapersónum við partabrøvum tey fyrstu árini, eigur hetta ongar skattligar avleiðingar at fáa, tá ið partabrøvini verða handað. Í staðin eiga tey at verða skattað tá sum vanlig partabrævainntøka, tá ið tey verða seld.

Hetta fer, at gera tað munandi lættari hjá nýstovnaðum virkjum at seta lyklapersónar í leiðandi størv innan leiðslu, sølu og marknaðarføring.

Tað er ikki av ongum, at OECD nevnir skattaviðurskiftir, sum eitt lyklaorð fyri um íverksetan í einum landi eydnast ella ikki.

## ”Tjóðveldi onga ávirkan á fiskivinnupolitikkin seinastu 28 árini”

**BJØRN KALSØ**

løgtingsmaður



**”Tjóðveldisflokkurin hevur onga ávirkan havt á fiskivinnupolitikkin í Føroyum seinastu 28 árini”. Orðini, søgd í morgunsendingini í Útvarpinum, átti nýkosni landsstýrismaðurin í fiskivinnumálum, Torbjørn Jacobsen. Leikluturin hjá Tjóðveldi seinastu kvartu øldina á fiskivinnuøkinum var ikki av týdningi ljóðaði.**

**Tjóðveldi onga ávirkan**

”Síðan landsstýristíðina hjá Peturi Reinert, sála og seinni Heðini M. Klein fyri 28 árum síðan, hevur Tjóðveldisflokkurin onga ávirkan havt á fiskivinnupolitikkin í Føroyum”. Á leið hesi orðini átti nýkosni ráðharrin í fiskivinnumálum Torbjørn Jacobsen, týsdagin 12. februar í morgunsendingini hjá Útvarpinum.

Kenslan, eftir at hava hoyrt fremstu fiskivinnupolitisku rødd Tjóðveldisins, var ein staðfesting av, at Tjóðveldisflokkurin leggur seg flatan fyri sínum samgongufeløgum.

Besta dømið er fullveldissamgongan, tá fiskivinnulóggávan á nógvum økjum varð ofrað við sera óhepnum fylgjum. Fiskiloyvini gjørdust søluvøra í einari rullandi óendaligari skipan, línuflotin øktist ótarnaður, og útróðrarflotin var fyri hóttafalli.

Nógvar rættingar eru gjørdar í lógini um vinnuligan fiskiskap í seinastu samgongu. Nevnast kunnu ”Fiskapakkin”, sum gav ráfiskakeyparum eina meira javnbjóðis atgongd til rávøruna, ”110 tons skottið” sum steðgaði vøkstrinum í línuflotanum og bjargaði tí, ið eftir var av útróðrarflotanum, herd brúksskylda og staðfestingin av ognarrættinum, sum hevur tikið ringasta broddin av spekulatiónini, bert fyri at nevna nøkur dømi. Neyðugt er tó við fleiri tillagingum, sum nýggja samgongan vónandi í semju við vinnu og andstøðu á Tingi fer at fremja.

**Einki grett um seinastu kvartu øldina**

Einki orð fall í samrøðuni um eldsálina, fiskivinnuprofilin og ellisforsetan á Løgtingi, Heina O. Heinesen, sum annars beint eftir, at Jacobsen kom í ráðharrasessin, varð kosin fremsti ráðgevi ráðharrans. Hóast hetta vóru mongu ár Heina á Løgtingi strikað úr fiskivinnusøgu føroyinga í útvarpssendingini týsmorgunin.

Stór mótsøgn má tað sigast at vera, at Heini O. Heinesen undir valstríðnum førdi seg fram við økisfriðingunum á Føroyagrunninum, sum faðir at lógini um vinnuligan fiskiskap frá 1994, sum fyrrverandi formann í Vinnunevndini við stórari ávirkan á fiskivinnupolitikkin og sum harðasta mótstøðumann móti Tilfeingisbúðini hjá Torbirni.

**Sosialurin**

**Sosialurin**
Stovnaður: 1927
**Ábyrgdarblaðstjóri:** Jan Müller jan@sosialurin.fo
**Blaðstjóri:** Eirikur Lindenskov eirikur@sosialurin.fo
**Redaktiónsleiðari:** Kári Mikkelsen karim@sosialurin.fo

**Marknaðardeild:** lysing@sosialurin.fo
**Marknaðarleiðari:** Gudny Langgaard gudny@sosialurin.fo
Birgir Waag Høgnesen birgir@sosialurin.fo
Joan Abrahamsen joan@sosialurin.fo
Henrietta Hammer henrietta@sosialurin.fo

**Blaðfólk:**
Áki Bertholdsen aki@sosialurin.fo
Vilmund Jacobsen vilmund@sosialurin.fo
Snorri Brend snorri@sosialurin.fo
Magnus Gunnarsson maggi@sosialurin.fo
Rigmor Dam rigmor@sosialurin.fo
Rólant Waag Dam rolant@sosialurin.fo
Niels Uni Dam nielsuni@sosialurin.fo
Leo Poulsen leo@sosialurin.fo
Dorit Hansen dorit@sosialurin.fo
Eyðun Klakstein eydun@sosialurin.fo
Eydna Skaale eydnaskaale@sosialurin.fo
Anna V. Ellingsgaard anna@sosialurin.fo

**Ítróttur:**
Jákup Mørk jakup@sosialurin.fo
Niels Mortensen niels@sosialurin.fo

**Kykmyndir:**
Alvin Ellebye Andersen alvin@sosialurin.fo

**Sosialurin í Norðoyggjum:**
Nólsoyar Pálsgøta 1, 700 Klaksvík
tel. 458686 fax 458687
e-post: klaksvik@sosialurin.fo

**Sosialurin í Suðuroy:**
tel. 375364 fax 375464
tel. 228814
e-post: aki@sosialurin.fo
e-post: dagfinn@sosialurin.fo

**!!! Haldarar**
sum ikki hava fingið blaðið, kunnu ringja til 341818 og boða frá, leygardag tó frá kl. 11.00-13.00

**Uppseting/prent:**
Uppseting: Sosialurin
Prent: Prentmiðstøðin
**Útgevari:**
Sp/f Sosialurin
**Avgreiðsla:**
Mán.-frí. 8-16
Tórsgøta 1, 100 Tórshavn
Tel. 341800, Fax 341801
**Postadressa:**
Postboks 76, 110 Tórshavn
**E-mail:**
post@sosialurin.fo
lysing@sosialurin.fo
lysingartorg@sosialurin.fo
varp@sosialurin.fo

Blaðið verður prentað mánadag-fríggjadag klokkan 13[30]

**Lýsingar**

| Freistir: | Tekstlýsingar | Størri lýsingar | Lýsingartorgið | Heilsanir |
|---|---|---|---|---|
| Mánadagsblaðið | Mán.kl. 10 | Frí. kl. 15 | Frí. kl. 12 | Frí. kl. 12 |
| Týsdagsblaðið | Týs. kl. 10 | Mán. kl. 15 | Mán. kl. 12 | Mán. kl. 12 |
| Mikudagsblaðið | Mik. kl. 10 | Týs. kl. 15 | Týs. kl. 12 | Týs. kl. 12 |
| Hósdagsblaðið | Hós. kl. 10 | Mik. kl. 15 | Mik. kl. 12 | Mik. kl. 12 |
| Fríggjadagsblaðið | Frí. kl. 09 | Hós. kl. 15 | Hós. kl. 12 | Hós. kl. 12 |

Størri lýsingar, sum nógv arbeiði stendst av, mugu vera inni í góðari tíð og áðrenn ásettu freistir.
Framíhjápláss má umbiðjast í góðari tíð.

**Stødd:**
Ein heil síða í Sosialinum er 254 mm breið og 346 mm í hædd. Breiddin á einum teigi er 39 mm og rúmið millum teigarnar er 4 mm.

**Innsent tilfar**
Fult navn skal vera undir innsendum tilfari. Innsendar greinar, har blaðleiðslan ikki er kunnað um bústað og telefonnummar, verða ikki settar í blaðið.